e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Eingin 1. deild um vikuskiftið

*Sum støðan er í løtuni, verða helst eingir dystir leiktir um vikuskiftið*



*Dómarafelagið gevur nú FSF gula kortið, tí teir meta seg ikki hava nóg stóra ávirkan í málum, sum viðvíkja trygdini hjá dómarunum*
***Tilvildarliga vald mynd***

Jákup Mørk

Hóskvøldið hevði dómarafelagið fund, har revsingin til KÍ fyri hendingina í undanfarna heimadysti var til viðgerðar.

Hetta hendi, tí fleiri dómarar mettu, at talan var um alt ov lina revsing, og m.a. segði Oddmar Andreasen, sum dømdi umtalaða dystin, at dómurin frá kappingarnevndini var langt úti.

Á fundinum hóskvøldið orðaði dómarafelagið soljóðandi skriv til kappingarnevndina:

»Á fundi í kvøld kl. 19.30 bleiv samtykt við stórum meiriluta, at okkara limir døma ikki 1. deild menn komandi vikuskifti.

Orsøkin til hetta er tann avgerðin, sum FSF hevur tikið í málinum í dystinum KÍ-B68, har ein hjálpardómari bleiv sligin í búkin.

Hendan síðsta avgerð hjá FSF fekk bikari at flóta yvir hjá fótbóltsdómarunum.

Hendingin í Klaksvík er ikki tann einasta tey síðstu árini.

Vit føla okkum sera illa viðfarnar tá slík mál verða avgjørd, t.d. hava vit onga ávirkan og verða slett ikki eftirspurdir, tá avgerðin fellur.

T.d. kundi Dómarafelagið havt lim í Kappingarnevndini og Dómsnevndini, men so er ikki.«

Brævið er undiskrivað vegna Dómarafelagið av Hans Falkvard Hansen, formanni

### Skrivið er endaligt

Hans Falkvard Hansen, formaður í dómarafelagnum, sigur, at avgerð felagsins verður ikki broytt:

Stutt eftir fundin hjá dómarafelagnum hóskvøldið hittu vit formannin, Hans Falkvard Hansen, á máli.

Spurdur um skrivi til kappingarnvndina var eitt forhandlingsútspæl, soleiðis at avgerðin framvegis kundi broytast, segði hann, at tað var tað ikki.

- Boðini frá okkum eru greitt sett upp í skrivinum, og tí dømir eingin av limum okkara 1. deildardystir komandi vikuskifti, sigur Hans Falkvard við Sosialin.

Spurdur hvussu nógvir dómarar vóru á fundinum, segði hann, at talan var um nakrar og tjúgu dómarar, sum verður mett at vera hampuliga góð uppmøting.

Annars vildi formaðurin ikki gera nakrar serliga viðmerkingar, men vísti ístaðin til skrivið, sum er latið Fótbóltssambandinum

### Støðan er harmilig

Børge B. Hansen, formaður í kappingarnevndini, er keddur um avgerðina hjá dómarunum:

Tá vit hóskvøldið tosaðu við formannin í kappingarnevndini, Børge B. Hansen, hevði hann enn ikki fingið skrivið frá dómarafelagnum.

Eftir at hava fingið boðini umvegis telefonina, var fyrsta viðmerking hansara, at talan var um eina harmiliga støðu.

- Tað er sera harmiligt, at dómarafelagið soleiðis forðar ungdómum okkara í at spæla fótbólt, men hinvegin er hetta teirra fulli rættur, og tað fáa vit ikki gjørt nakað við, segði Børge, sum eisini var keddur um, at dómarafelagið sostatt ikki virðir avgerðina hjá kappingarnevndini.

### Viðgjørt sum onnur skriv

Spurdur, hvørjar avleiðingar stigið frá dómarafelagnum fær, svaraði formaðurin, at tað kundi hann als ikki siga nakað um.

- Nú havi eg akkurát fingið boðini, men øll skriv til nevndina verða sjálvandi viðgjørd, og soleiðis verður eisini í hesum sambandi, sigur Børge.

Hann legði tó afturat, at tað fyri sær var nakað heilt nýtt, at dómarafelagið ynskti at fáa lim í Kappingarnevndina og Dómsnevndina. – Nevndirnar verða valdar á aðalfundinum hjá FSF, og eg havi ongantíð hoyrt nakað ynski frá dómarunum um at eiga umboð í hesum nevndum.

Aðrar viðmerkingar hevði formaðurin í kappingarnevndini ikki, og sostatt er líkt til, at eingin fyrstudeildarfótbóltur verður at síggja hetta vikuskiftið.

### Ikki hent í Danmark

Fyri at kanna, hvussu slík mál verða handfarin aðrastaðni, settu vit okkum í samband við dómaranevndina hjá DBU.

Har upplýsti Knud Albertsen fyri okkum, hvussu mannagondin í slíkum málum var, og er hon so at siga lík teirri føroysku.

Spurdur um teir høvdu nakað fordømi fyri tilburði, har dómari ella hjálpardómari var sligin, segði hann, at tað høvdu teir ibetur ikki havt, tað hann visti um.

Tískil kundi hann ikki peika á, hvussu slíkt mál hevði verið revsað í Danmark.

### Upptaktin

Orsakað av ósemjuni millum dómarafelagið og FSF, hava vit ikki prentað nakra upptakt til komandi umfarið í 1. deild.

Um so er, at støðan broytist, soleiðis at dystirnir kortini verða leiktir, ber til at lesa upptaktina til hesar á internetsosialinum: www.sosialurin.fo



*- Vónandi fara menn at sissa seg, so dystirnir um vikuskiftið kunnu avgreiðast, heldur FSF formaðurin*

# - Dómararnir yvirreagera

*FSF formaðurin hevur enn ikki slept vónini um, at dystirnir um vikuskiftið kunnu avgreiðast, sum ásett*

Jákup Mørk

Torleif Sigurðsson, formaður í Fótbóltssambandinum, sigur, at eftir hansara tykki er atburðururin hjá dómarafelagnum alt ov ógvusligur.

### Fylgja ikki reglunum

Eftir hansara tykki fylgir felagið als ikki teimum mannagongdum, sum vanliga eru galdandi, og harumframt metir FSF-bossurin eisini, at atburðururin hjá dómarafelagnum er greitt brot á spælireglurnar.

- Tað stríðir beinleiðis móti reglugerðunum hjá FSF, at dómararnir nú krevja at fáa lim í kappingar- og dómsnevndina, og harumframt eru teir als ikki gegnligir til at sita í hesum nevndum, tí avgerðirnar viðkoma teimum sjálvum. Eru teir misnøgdir við ein dóm hjá t.d. kappingarnevndini, hava teir altíð møguleikan at skjóta henda inn fyri dómsnevndina, sum hevur heimild at broyta dómin hjá kappingarnevndini, sigur Torleif Sigurðsson.

Víðari sigur hann, at tá hann tosar um brot á spælireglurnar, so meinar hann við tann háttin, sum dómarafelagið hevur handfarið málið.

- Vit hava altíð havt eina greiða avtalu um, at ósemjur av slíkum slag skulu avgreiðast millum FSF og dómararnar, og ikki í fjølmiðlunum, tí hetta er bert við til at skapa øsing um málið, og tað hava vit ongan áhuga í.

### Vónar at menn sissa seg

Hvørja avleiðing hetta fær fyri samstarvið millum FSF og dómarafelagið veit Torleif ikki at siga, men hann heldur als ikki, at FSF kann loyva, at dómararnir á henda hátt eru við til at oyðileggja landskappingina.

- Uttan at tað skjal ljóða sum nøkur hóttan, so mugu vit umhugsa, um samstarvið kann halda fram í verandi líki, ella um nøkur stig skulu takast í so máta. Eitt nú hava vit í fleiri ár stuðlað dómarunum bæði so og so, t.d í samband við uttanlandsferðir og annað, men alt hetta fái eg sjálvandi ikki svarað í løtuni.

At enda sigur formaðurin í FSF, at tað er hansara vón, at menn sissa seg, soleiðis at dystirnir kunnu avgreiðast, soleiðis sum ásett í kappingarskipanini.

- Eg seti mítt álit á, at nevndin í dómarafelagnum onkursvegna greiður fløkjuna, soleiðis at dystirnir kunnu avgreiðast. Vit hava longu boðað frá, at vit eru sinnaðir at hava fund fyrst í komandi viku, soleiðis at tosast kann um málið.

Klandur og stríð hava vit nóg mikið av frammanundan, so vónandi kann hetta avgreiðast á skilabesta hátt, sigur formaðurin at enda.



# Fleiri ætla at basa Eysturoyinginum

***Kappróður:** Fýra nýggj 10–mannafør bjóða av, og í øðrum bátastøddum eru bátar komnir afturíaftur, sum ikki hava verið at sæð í fleiri ár*



*Higartil hevur nýggi Eysturoyingur vunnið allar FM-róðrar, sum hann hevur luttikið í, men í ár fáa teir væntandi sera harða kapping. M.a. frá fýra nýggjum 10-mannaførum*

Áhugin fyri kappróðri tykist vera stórur og vaksandi. Tað sæst á luttøkuni í fyrsta FM róðrinum, sum verður í Klaksvík seinnapartin í dag.

Undanfarnu árini hevur verið tosað um, at áhugin millum dreingjamanningarnar hevur verið minkandi. Hesa ferð kappast níggju dreingjabátar, og tað man vera langt síðani, at tað hava verið átta 6–mannafør við kvinnum í kappingini, og at 8–mannaførini hava verið tíggju í talið.

Vert er m. a, at leggja til merkis, at kappróðrarfelagið NSÍ fyri fyrstu ferð í mong ár luttekur í kappingini millum 8–mannafør. Í seksti árunum plagdu teir at vinna við 8–mannafarinum Sølmundi. Tey mongu seinnu árini hava teir havt eitt 6–mannafar við hesum navninum, men nú eru teir komnir afturíaftur millum 8–mannaførini, og tað við lít.

Teir í Runavík manna tvey 8–mannafør. Annar báturin er Heiðabáturin, ið er gamli Skopuningurin, sum teir hava sett í stand, so hann er um nýggjur, og hin er Toftabáturin, sum teir hava lænt longri úti á eystara armi av Skjálafjørðinum.

Eisini er vert at leggja til merkis, at Oyndri er komin afturíaftur. Báturin í Oyndarfirði vann FM í 1976, 1977 og aftur í 1982 og í 1983. Í fjør luttók hann ikki. Í ár hava teir vant á Oyndarfirði, og nú hava teir dittað sær aftur á norðoyarstevnu.

### Nógvir avbjóðarar

Kappingin millum 10–mannaførini hevur altíð verið nakað serligt fyri róðraráhugað.

Soleiðis er tað eisini í ár. Spenningurin hesa ferð snýr seg um, um tað fer at eydnast hjá hinum at taka Eysturoyingin. Báturin hjá kappróðrarfelagnum NSÍ hevur vunnið allar stevnurnar tey bæði árini, sum hann hevur tikið lut í FM kappingunum.

Burtursæð frá á ólavsøku í fjør, tá tað var um reppið, at Vestmenningur vann, so hevur Eysturoyingur verið heilt einaráðandi. Millum róðrarkøn verður roknað við, at tað fer at vera torførari hjá gula bátinum at hava somu serstøðu í ár.

Ein orsøk til hetta verður søgd at vera, at tað hevur verið gjørt nógv við venjingina umborð á teimum fýra nýggju bátunum. Og ein onnur orsøk verður søgd at vera, at teir umborð á Eysturoyingi hava verið sera óhepnir, undir fyrireikingini til árið, tá teir hava sagt seg ætlað at vunnið øll ferðasteypini til ognar.

Á bygdastevnuni á Skála endaði Eysturoyingur aftastur. Tað komst m. a. av, at tveir av mansskapinum vórðu skaddir stutt undan róðrinum. Annar teirra – hann hevði brotið hælabeinið – verður ikki við á norðoyarstevnu, meðan hin verður við, sjálvt um hann orsaka av brákaðum rivjabeini hevur mist nógva venjing. Manningin umborð á Eysturoyingi í fjør var tann sam, sum hon var í fyrraárið. Síðani í fjør eru onkrir skiftir út, tí tað hevur ikki borið teimum til at rógva.

Vestmenningar verða mettir at fara at vera ein av størstu hóttanunum móti Eysturoyingi. Tað er bara ein rúm vika, síðani teir í Vestmanna flotaðu nýggja 10–mannafarið. Men frammanundan hava teir vant nógv í tí bátinum, sum teir í fjør vóru um reppið at taka Eysturoyingin við.

Nýggi Havnarbáturin vann á bygdarstevnuni á Skála. Teir, sum í fjør vunnu FM kappingina millum 8–mannaførini við Ørvi, rógva nú við Havnarbátinum. Í høvuðsstaðnum siga tey, sum eygleiða róðrarvenjingina, at nýggi báturin gongur sera væl.

### Største felagið

Merkisvert er tað, at kappróðrarfelagið NSÍ er tað sum hevur flest manningar við í kappingini. Tað eru ikki so mong ár síðani, at manningarnar hjá teimum vóru tríggjar og fýra. Í dag fara níggju manningar úr róðrarfelagnum NSÍ til Klaksvíkar.

Teir manna spildurnýggja 5–mannafarið Tjaldrið við dreingum og gentum, og gamla Tjaldrið, sum nú eitur Spógvin, manna teir eisini við dreingjum og gentum. Sølmundur er mannaður við kvinnum og monnum, so eru tað 8–mannaførini Heiðabáturin og Toftabáturin og so Eysturoyingur.

Í blaðnum hósdagin søgdu klaksvíkingar, at teimum longdist eftir einum vinnarabáti. Teir roknaðu við, at um teir fingu ein vinnarabát, so fór áhugin fyri kappróðri í Klaksvík at økjast nógv. Hetta hevur ofta víst seg, og ikki minst kappróðrarfelagið NSÍ er gott dømi um hetta.

Føroyameistararnir í fjør vóru hesir: 5–mannafør dreingir: Havfrúgvin úr Vestmanna. 5–mannafør gentur: Havfrúgvin úr Vestmanna. 6–mannafør menn: Hvessingur úr Hvalvík/Streymnesi. 6–mannafør kvinnur: Jarnbardur úr Havnini, 8–mannafør: Ørvur úr Havnini og Eysturoyingur vann kappingina millum 10–mannaførini.

JH

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild, menn**
(sum ásett av FSF)

| | | |
|---|---|---|
| 04.06 | B71-FS Vágar | Birgir Sondum |
| 04.06 | HB-B68 | Petur Reinert |
| 04.06 | NSÍ-B36 | Jens Petur Brattralíð |
| 04.06 | KÍ-Sumba | Petur Hansen |
| 04.06 | VB-GÍ | Oddmar Andreasen |

**2. deild, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 03.06 | TB-LÍF | Jens Petur Brattalíð |
| 03.06 | GÍ-EB/Streymur | Petur Reinert |
| 03.06 | B36-Royn | Eerling Eysturoy |
| 03.06 | ÍF-NSÍ | Tummas Pauli Olsen |
| 03.06 | KÍ-HB | Tommy O. Joensen |

**3. deild, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 04.06 | B71-FS Vágar | Hans F. Hansen |
| 04.06 | AB-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 04.06 | Skála-B36 | Dagfinn Olsen |
| 04.06 | KÍ-TB | Kristian Joensen |
| 04.06 | VB-ÍF | Zoran Mancic |

**kvinnudeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 04.06 | HB-GÍ | Hans Eivind Olsen |
| 04.06 | Sumba-AB | Frits Poulsen |
| 04.06 | Skála-VB | Sunleif Álaberg |
| 04.06 | KÍ-B71 | Allan Joensen |
| 04.06 | EB/Streymur-B36 | Aron Olsen |

# Níggju nýggir

***Kappróður:** Áhugin kring landið at fáa nýggjar kappróðrarbátar er so stórur, sum hann ongantíð áður hevur verið*

Tað er neyvan komið fyri áður, men í dag er tað ein veruleiki. Á norðoyastevnu eru ikki færri enn níggju spildurnýggir kappróðrarbátar, sum fyri fyrstu ferð fara at taka lut í FM kappingini. Talan er um fýra 10–mannafør, fýra 5–mannafør og eitt 6–mannafar.

10–mannaførini eru Havnarbáturin, Nólsoyingurin, Vágbingurin og Vestmenningurin. 5–mannaførini eru Dúgvan úr Sørvági, Falkur úr Hósvík, Frúgvin úr Miðvági og Tjaldrið úr Runavík. Og so hevur Havnar Róðrarfelag latið eitt nýtt 6–mannafar smíðað. Tað eitur Gongurólvur.

Tað eru fýra bátasmiðir, sum í vetur og í vár hava smíðað allar hesar bátarnar. Sámal Hansen í Runavík hevur smíðað Havnarbátin, Nólsoyingin, Frúnna og Tjaldrið. Kaj Hammer í Havn hevur smíðað Vágbingin, Dúgvuna og Falkin, Magni Nielsen í Havn hevur smíðað Gongurólv, og Olaf Halvdansen í Vestmanna hevur smíðað Vestmenningin.

### Summir ódrúgvir

Tað er eingin loyna, at tey seinnu árini hava tað ofta verið nýggju bátarnir, sum hava vunnið.

Besta dømið um ein nýggjan bát, sum hevur vunnið nógv, er Eysturoyingur, sum hevur vunnið allar tólv FM kappingarnar, sum hann hevur tikið lut í. Millum róðrarhugað hevur verið røtt og mett um, um tað nú hevur verið fólkið ella báturin, sum hava verið orsøkin til sigursrøðina. Víst hevur m. a. verið á, at áhugin fyri einum nýggjum báti hevur havt við sær, at manningin hevur verið góð, og at hugurin at venja hevur verið betri, enn hann hevur verið hjá so mongum øðrum.

Men tað eingin sjálvfylgja, at ein nýggjur kappróðrarbátur vinnur. Nýggjasta dømið um hetta er 10–mannafarið hjá tvørámonnum, sum teir fingu í fyrraárið og sum luttók á øllum stevnunum í fjør. Teir vunnu onga stevnu, og Tvørábáturin er ikki millum tey seks 10–mannaførini, sum eru meldað til kappróðurin á norðoyarstevnu.

JH

# Annað hvørt

***Kappróður:** Á trimum stevnum verður róð á fleiri teinum, og á trimum stevnum verður bara róð á eitt túsund metrum*

Í dag verður farið undir FM kappingina í róðri. Róðrarfólkið hevur verið í bátinum síðani flaggdagin, og tað verður ikki helmað í aftur fyrr enn ólavsøkuaftan. Í fyrstuni vandu róðrarfólkini kondition, og tey róðu langt og seigan. Ta seinnu tíðina hava tey vant syttri og títtari venjing, og í vikuni uppundir fyrstu FM kappingina hava tey meiri tikið sær av løttum, soleiðis at tey so at siga vera svong og væl trimmað, tá tey seinnapartin í dag seta sjøtul á FM kappingina.

Venjingin verður m. a. løgd til rættis eftir, hvussu langir teinarnir eru, sum tað skal kappast á. Umstøðurnar eru tær somu fyri allar manningarnar, men róðrarfólk hava víst á, at í ár er tað eitt sindur tvørligt, tí stevnurnar, har tað bara verður kappast á eitt túsund metrum, koma inn ímillum stevnurnar, har tað verður kappast á teimum longru teinunum.

Á norðoyarstevnu rógva dreingirnir, genturnar og kvinnurnar umborð á 6–mannaførum eitt túsund metrar. Hinar manningarnar rógva fimtan hundrað metrar. At 10–mannaførini ikki kappast á tvey túsund metrum kemst av, at nógva alivirksemið undir Kunoyarlandinum ger, at tað ikki ber til at rógva har.

Næsta FM stevnan verður í Runavík leygardagin 17. juni. Tá verður róð á øllum trimum teinunum. Á jóansøku, sum verður í Vági 24. juni, verður bara kappast á eitt túsund metrum.

Sundalagsstevnan verður í Kollafirði 1. juli, og tá verður kappast á øllum trimum teinunum. Vestanstevnan verður í Vestmanna 15. juli, og tá verður bara kappast á eitt túsund metrum, og tað verður tað eisini gjørt á ólavsøku.

JH